# Hey tú!

Kom og hjálp okkum at menna Rás2, Sosialin og Portalin. Í Miðlahúsinum í Vágsbotni vilja vit støðugt styrkja okkum til avbjóðingarnar í einum livandi fjølmiðlaheimi.

Síðani oktober í fjør hevur Rás2 verið partur av okkara samtaki, sum er í støðugari menning. Nú sóknast vit eftir fólki at styrkja um tíðinda- og aktualitets partin á redaktiónini, fyrst og fremst á Rás2.

Sum partur av Miðlahúsinum fært tú møguleikan at virka í einum livandi og dynamiskum fjølmiðlaumhvørvi, har vit í felag royna at gagnnýta styrkir og møguleikar hjá okkara miðlum. So hevur tú hug til tíðindaheimin? Nøs fyri eini góðari søgu? Hevur tú hug og evni, bæði at arbeiða sjálvstøðugt og tætt saman við øðrum. Og dámar tær avbjóðingar? So lat okkum frætta frá tær!

Útbúgving og/ella royndir innan fjølmiðlaøkið eru absolutt fyrimunir, men tó ikki treytir.

Tú byrjar í starvi hjá okkum skjótast tilber, men helst ikki seinni enn 1. august.

Tú frættir meira um starvið við at seta teg í samband við Jan Müller, stjóra, á telefon 341800. Eisini ber til at senda teldubræv til jan@sosialurin.fo

Merkið brævbjálvan »umsókn« og sendið hesa í seinasta lagi 25. juni til:

**P/F Miðlavarpið**
**Postsmoga 76**
**FO-110 Tórshavn**

Samtakið kring Miðlahúsið fevnir um Sosialin og Miðlavarpið, ið rekur Rás2. Í samtakinum starvast í dag 42 fólk.



RÁS ...títt radio

# Skráin fyri Rás 2

## Týsdagur 17. juni

07:00 Tónleikur
08:00 Føroyar mítt land – Janus Mohr leggur til rættis
08:05 Tónleikur
09:00 Føroyar mítt land – Janus Mohr leggur til rættis
09:05 Morgunroðin – James Olsen og Eyðfinn Drewsen eru vertir
11:00 Tíðindi
11:05 Morgunroðin heldur fram – James Olsen og Eyðfinn Drewsen eru vertir
11:30 Lýsingar
12:00 Tíðindi
12:15 Hittónleikur
13:00 Ynskiløtan – Mirjam Pætursdóttir er vertur
15:00 Tíðindi
15:05 E-Drewið – Eyðfinn Drewsen leggur til rættis.
16:00 Tíðindi
16:05 Bilradio – Maggi Gunnarsson leggur til rættis.
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
19:00 Tónleikur
21:00 Á Torginum – Svenning av Lofti leggur til rættis.
22:30 Føroyar mítt land – Janus Mohr leggur til rættis
22:35 Tónleikur
23:00 Føroyar mítt land – Janus Mohr leggur til rættis
23:05 Bestubitar úr Morgunroðanum í morgun – James og Eyðfinn eru vertir.

## Mikudagur 18. juni

07:00 Tónleikur
08:00 Føroyar mítt land – Nicolina Jensen Beder leggur til rættis.
08:05 Tónleikur
09:00 Føroyar mítt land – Nicolina Jensen Beder leggur til rættis.
09:05 Summartíð – Eydna Skaale og Eyðun Klakkstein eru vertir
10:00 Lýsingar
10:05 Summartíð – Eydna Skaale og Eyðun Klakkstein eru vertir
11:00 Tíðindi
11:05 Summartíð – Eydna Skaale og Eyðun Klakkstein eru vertir
11:30 Lýsingar
12:00 Tíðindi
12:15 Hittónleikur
13:00 Seinnapartssending – Eyðun Klakkstein leggur til rættis
15:00 Tíðindi
15:05 Ynskiløtan
16:00 Tíðindi
16:05 Ynskiløtan
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
19:00 Summartíð (e) – Eydna Skaale & Eyðun Klakstein leggja til rættis
21:00 3. Hálvleikur – Formulakappingin
22:00 Føroyar mítt land – Nicolina Jensen Beder leggur til rættis.
22:05 Úr skjáttuni – Evni: Føroyska arbeiðið í Eliaskirkjuni í Keypmannahavn. Prát við Róa Sigvardsen, formann fyri stýrið. Magni Højgaard er vertur
23:00 Føroyar mítt land – Nicolina Jensen Beder leggur til rættis.
23:05 Summartíð (e) – Eydna Skaale & Eyðun Klakstein leggja til rættis

## Hósdagur 19. juni

07:00 Tónleikur
08:00 Føroyar mítt land – Helena Samuelsen leggur til rættis
08:05 Tónleikur
09:00 Føroyar mítt land – Helena Samuelsen leggur til rættis
09:05 Stevnusending úr Vági – Sent verður úr nýggja handilscentrinum Torgið í Vági
10:00 Lýsingar
10:05 Stevnusending úr Vági – Sent verður úr nýggja handilscentrinum Torgið í Vági
11:00 Tíðindi
11:05 Stevnusending úr Vági – Sent verður úr nýggja handilscentrinum Torgið í Vági
11:30 Lýsingar
12:00 Tíðindi
12:15 Hittónleikur
13:00 Stevnusending úr Vági – Sent verður úr nýggja handilscentrinum Torgið í Vági
15:00 Tíðindi
15:05 Ynskiløtan – Mirjam Pætursdóttir
16:00 Tíðindi
16:05 Ynskiløtan – Mirjam Pætursdóttir
17:00 Tíðindi
17:15 Vespureiðrið – Beinleiðis úr Runavík
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
19:00 Morgunsendingin (e)
20:00 Lýsingar
20:05 Morgunsendingin (e)
21:00 Orð á Leiðini – Sending hjá EVR
21:30 Tónleikur
22:00 Føroyar mítt land
22:05 Stevnusending 1 (E)
23:00 Føroyar mítt land
23:05 Stevnusending 2 (E)
23:55 Liðugt

Rás2 mikumorgun 9-12
**Summartíð**

## Summartíð á Rás2

Í summar verður Summartíð á Rás2 mikumorgun millum klokkan 9 og 12. Á skránni verður lætt summartilfar, fólk vitja í studio, og vit fara á vitjan hjá fólki, góður tónleikur verður spældur – eisini live-tónleikur viðhvørt – og lurtararnir kunnu vinna spennandi vinningar. Vertir í Summartíð verða Eydna Skaale og Eyðun Klakstein.

## Vinn ferðaseðlar til Countrytúrin

Summartíð bjóðar spennandi kapping mikumorguin. Tú kanst vinna tveir ferðaseðlar til Countrytúrin við Norrønu tann 23. juni. Temaið á Countrytúrinum í ár er Johnny Cash, og høvuðsnavnið er Hallur Joensen. Umborð verður eisini fyrilestur um legenduna Johnny Cash. Noel's Bluegrass Band, Johnny Cash Jam, felagssangur og skemt við Hans Hjalta Skaale og Regin Jakobsen. Biografurin fer at vísa filmin »Walk the Line« og live koncertina við Johnny Cash í Las Vegas. Fyri at verða við í kappingini, skalt tú senda eini sms-boð til Summartíð (559999) og siga tína hugsan um countrytónleik.

## Hallur spælir live

Føroyska countrystjørnan Hallur Joensen vitjar Summartíð mikumorgunin. Hallur fer at spæla live í sendingini, og tosað verður eisini við hann um, hvussu hann sum ungur sníkti seg at lurta eftir countrytónleiki. Tá var tað næstan flóvisligt at dáma country, men nú er Hallur blivin eitt tað fremsta føroyska umboðið innan countrytónleik.

RÁS ...títt radio